## DAGSINS MEINING

# Konfrontatiónsdyrkan

Einki savnar so væl fólk um eina nationalistiska søk sum ein konfrontatión av einum ella øðrum slag. Eitt bankamál afturat hevði verið funnin fressur hjá samgonguni, ið millum lítið og einki hevur fingið av skafti viðvíkjandi yvirtøkum.

Fregnir tosar um totala konfrontatión í samband við ætlaðu yvirtøkuni av løgregluni. Nú skulu vit ikki taka dagar ímillum, um teir kanska hava lyndi at gera í so nógv av, men Tjóðveldisflokkurin stendur so ikki til at missa nakrar atkvøður við at framprovokera eina konfrontatión við donsku stjórnina, nú tað stundar móti vali.

Tað kann illa passa, at alt skal enda í klandri og konfrontatión, tí danir eru so ringir at hava við at gera, og at feilurin altíð bara liggur á einari síðu. Hvussu ber tað til, at tað altíð er danska stjórnin, sum er langt úti og brýtur allar demokratiskar og fólkarættarligar mannagongdir? Liggur veruliga eingin feilur her hjá okkum?

Tá man sær, hvussu ringt hendan samgonga hevur við at skapa semju um nakað sum helst her í Føroyum, hvussu kunnu vit so vænta, at teir uppføra seg diplomatiskt uttan fyri landoddarnar?

Breiða semjan kom ongantíð. Tjóðveldisflokkurin tykist forða fyri pragmatiskum loysnum, tí at teir vilja eiga føroyskt sjálvstýri sum mál einsamallir, og tí er naggatódn komin í føroyska sjálvstýrismenning.

Hendan naggatódn verður ring at forklára til eitt valstríð, og er tað her konfrontatiónin kemur inn. Samonguni tørvar eitt mál, ið kann øsa fólk. Eitt mál, har danir og kanska enntá andstøðan eru syndararnir. Eitt mál, har alt er svart og hvítt — vit hava rætt og hinir — eitt nú danska stjórnin - eru langt úti, fyri at brúka eina frasu, sum varaløgmaður onkuntíð hevur brúkt.

Óivað verður heystið baldrut politiskt. Fíggjarlógin verður ring at semjast um, tá ið ein hyggur at samgongulagnum. Konfrontatiónin við danir fer ivaleyst at verða framprovokerað beint uppundir val, við vanda fyri at tað verður øsing, heldur enn ein objektiv vurdering av úrslitum, ið fer at avgera, hvar krossarnir verða settir.

Tað skal vera okkara vón at tann breiði meirilutin, ið hóast alt er ímóti órealistisku fullveldisætlan landsstýrisins forðar fyri, at ógrundað øsing, ST brøv og aðrar pínligheitir koma at verða høvuðstema til næsta val. Pensiónir, vinnupolitikkur og samfelagsmenning í breiðastu merking eiga at verða høvuðsevni. Tá verður evnið realpolitikkur, har størsti munurin millum vinstra og høgra koma til sjóndar. Um somu tíð eiga vit at taka týðandi stig á sjálvstýrisleið men við skili. Kann henda, at Tjóðveldisflokkurin fer at skora stemmur uppá eina øsing, men tað kann eisini koma at kosta honum dýrt — kosta honum valdið. Soleiðis sum nýggja leiðslan í Tjóðveldisflokkinum háttar sær og bara gongur egnar leiðir verður tað ivasamt, hvørjir flokkar vilja sita í stovu saman við honum eftir valið.

**Sosialurin**



*Øssur Mohr fer at sýna 20 nýggjar oljumálningar fram í Gallarí Riberhús í Fuglafirði komandi mánaðin*

# Øssur í Riberhús

Fríggjadagin letur listaframsýning upp í Gallarí Riberhúsi í Fuglafirði. Tað er fuglfirðingurin, Øssur Mohr, sum fer at sýna fram.

Øssur hevur 20 nýggjar oljumálningar við á framsýningini, sum verður opin til 8. september.

Tá ferniseringin verður fríggjadagin kl. 19.00 fer Frits Johannesen at hugleiða um list, og Andreas Heindriksdóttir fer at spæla nýggjan og eldri tónleik á tvørfloytu.

Gallaríð Riberhús er opið mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00 til 17.30. Leygardag frá 11.00 til 13.00.

# Rógvi vann

Sunnudagin tann 29. juli var kappast um felagsmeistaraheitið hjá Cycling Aarhus Elité.

Teinurin, sum súkklaður bleiv, var 7 umfør uppá 8,5 km á einum strekki frá Stjær til Storring og aftur til Stjær.

Rógvi koyrdi frá hinum á tí langa bakkanum, sum var á teininum, og til seinast var bert ein súkklari, sum kláraði at fylgja Rógva. Honum fór Rógvi frá á næstseinasta umfari og koyrdi síðani restina einsmallur og kom mál við uml. 2 minuttum til nr. 2.

Rógvi var felagsmeistari í Cycling Aarhus Elite í 1999, men orsaka av at hann luttók í Statoil kring Føroyar kappingini, fekk hann ikki vart sítt meistaraheiti í fjør, men í dag eydnaðist tað vágbingunum at afturvinna tað.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


# Bilar





*Palli Dalsgaard í Skálavík hevur skrivað sera áhugaverda bilasøgu úr Sandoynni. Her er ein mynd av Erling Wintereig í Skopun, sum koyrdi bil frá 1936 til kríggið endaði, við Chevrolet lastbilinum sum hann keypti í 1938. Húsið í lastini gjørdi Gregor Hentze timburmaður í Skopun. Undir krígnum var torført at halda bilarnar koyrandi, eingir eykalutir vóru at fáa, so tað sum brúkast skuldi, mátti antin finnast burturúr onkrum burturkasti, ella gerast á ein ella annan hátt. Mangul uppá dekk mundi verða ein tann størsti trupulleikin.*
*Mynd: Palli Dalsgaard*

## Føroyska bilasøgan – ein partur av siðsøgu okkara

**Føroya Ellisakfør hevur í fleiri ár arbeitt við at savna tilfar til eina føroyska bilasøgu, við tí í hyggju at geva eina bók út um evni. Ein faldari er gjørdur, sum lýsir hesa verkætlan. Um fígging fæst til vega, er onki til hildurs fyri at ein bók verður givin út komandi ár, tá 80 ár eru liðin síðan fyrsti bilur kom higar til lands 6 mai 1922**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Í 1995 varð samtykt í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør, at fara undir eina verkætlan til tess savna inn tilfar til eina bók um bilasøguna í Føroyum. Ein søgubólkur bleiv settur at arbeiða við eini verkætlan. Nógv áhugavert tilfar er savnað, og ein faldari er gjørdur, sum vísir hvat hendan ætlan gongur út uppá. Tað sum ger arbeiðið so áhugavert og spennandi er, at hetta er ein almenn søga um hópin av fólki og fyritøkum úr øllum landinum, heilt frá fyrst í 20. øld.

### Áhugaverd søga

Av tí at hetta er fyrstu ferð at ein slík søga verður savnað, er talan um eitt stórt og tíðarkrevjandi arbeiði. Tað áhugaverda við bilasøguni er, at vit kunnu fevna um hana alla, og fevnir í tíð ikki meira enn um eina mansævi. Vit eru eitt lítið samfelag, har øll koma hvør øðrum við. Tað er við tí endamálið, at skapa áhuga og varðveita ein stóran, og enn óskrivaðan part av mentan okkara, at Føroya Ellisakfør ætlar at geva út bók um føroysku bilasøguna, og tey fólk sum hava havt tilknýti til bilstarvsgreinina fram til okkara dagar.

### Fleiri skriva

Fleiri hava eftir áheitan sent sera áhugavert tilfar inn til søgubólkin hjá Føroya Ellisakførum. Til dømis Palli Dalsgaard í Skálavík, sum skrivar um bilar og fólk í Sandoynni, har t.d. fleiri lastbilar vórðu bygdir um til bussar. Sverri Djurhuus skivar um umhvørvið í Rættará, har hann hevði bilverkstað í mong ár. Jacob Lindenskov skrivar um Tryggingarsambandið Føroyar og biltryggingarnar. Manni Høgnesen í Klaksvík skrivar um bilasøguna í Norðoyggjum. Einar Petersen í Sørvági hevur savnað inn tilfar um bilar í Vágum. Umframt hetta hevur Hergeir Petersen í Havn savnað hópin av søguligum tilfari, heilt frá tí at fyrsti bilinum kom til landið. Enn er tó nógv tíðarkrevjandi arbeiði eftir at gera, serliga tíðin eftir kríggið.

# Faldarin »Føroyska bilasøgan út í bók«


Føroyska bilasøgan út í bók

FØROYA 1992 AKFØR
FØROYA ELLISAKFØR

Brot úr byrjanini til føroysku bilasøguna

Wenzel Petersen varð føddur tann 2. november 1887 í Tróndargøtu í Havn. Hann var sonur Petur Petersen úr Saltnesi. Tey fluttu til Havnar stutt áðrenn Wenzel varð føddur.

Liðugur við skúlan fór Wenzel í smiðjulæru. Sum útlærdur smiður fór hann 18 ára gamal til Keypmannahavnar, har hann starvaðist á Titan maskinverksmiðjuni. Samstundis fekk hann sær elektrikaraútbúgving. Hann búði í Danmark í eini 10 ár og giftist við Sofiu, dóttur Óla Svenn Svendsen úr Havn.

*Wenzel Petersen (1887-1954)*

Í 1916 fór hann út at sigla sum elektrikari í eitt ár. Har kom hann at sigla saman við einum dana, Vilhelm Nielsen, sum seinni giftist við systir konu Wenzels. Í 1919 keypti Wenzel Petersen Quillingsgarð í Havn saman við eigaranum av Sápuhúsinum. Har gjørdi hann eina smiðju, ein lítlan maskinverkstað og flutti inn har at búgva.

Samstarvið millum Wenzel Petersen og Vilhelm Nielsen byrjaði í 1920 og varði í eini sjey ár. Í hesum tíðarskeiði eydnaðist teimum at skapa søgu her á landi, við tað at teir í 1922 skipaðu fyri at fyrsti bilurin kom til Føroya tann 6. mai. Tað var ein 1-tons Ford-TT lastbilur, ið Júst Sivertsen og Johannes Olsen keyptu.

[illegible]

*Fyri at lýsa ætlanina við at gera eina føroyska bilasøgu er ein faldari gjørdur. Eftir áheitan frá Sámal Bláhamar hevur dekkfyritøkan, Goodyear Danmark A/S sponsorerað og latið faldaran prentað. Goodyear hevur havt sín leiklut í føroysku bilasøguni, og hava Goodyeardekk allarhelst verði á teimum fyrstu bilunum sum komu higar til lands. Fyrstu føroysku Goodyear lýsingarnar hjá Vilhelm Nielsen, eru heilt frá 1931. Í dag er tað Super Dekk í Havn, sum umboðar Goodyear dekkini.*
*Í faldaranum er eisini brot úr byrjanini til føroysku bilasøguna*
*Bilurin niðast til høgru er ein Hanomag frá 1928*